Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jacob Vestergaard, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Sjúkraflutningstænastan í Sandoynni

Spurningar:

1. Hvussu verður sjúkraflutningstænastan í Sandoynni skipað í framtíðini

Viðmerkingar:
Nú Sandoyartunnilin er latin upp, er óvissa um, hvussu sjúkraflutningstænastan í Sandoynni verður skipað í framtíðini.

Tænastan hevur verið skipað við sjúkrabili, staðsettum í Sandoynni.

Støðan var tann sama í Vágoynni, áðrenn Vágatunnilin varð tikin í nýtslu. Tá varð avgerð tikin um, at tænastan skuldi halda áfram, við sjúkrabili staðsettum í Vágum, og er tann skipanin galdandi enn.

Tænastan í Vágum er ein partur av sjúkraflutningstænastuni í miðstaðarøkinum, og kundi ein líknandi skipan verið galdandi fyri tænastuna í Sandoynni. Tað hevði verið ein styrki fyri samlaðu tilbúgvingina.

Á Løgtingi, 30. Januar 2024

Jacob Vestergaard